# Helgoland og Norðurhavsoyggjar

## *Heligoland and the Norwegian Islands in the North Atlantic*

*Zakarias Wang*
Hornavegur 16, FO-188 Hoyvík, Faroe Islands. Email: zakarias@olivant.fo

### Úrtak

Í 1814 kom friður í lag Stórabretlands, Svøríkis og Danmarkar millum. Stórabretland fekk frá Danmørk oynna Helgoland. Svøríki læt Danmørk svenska Pommern og Rügen móti at fáa Noreg, men í evstu stund var friðarsáttmálin broyttur, so norsku oyggjarnar í Norðurhøvum, Grønland, Føroyar og Ísland, ikki fylgdu við Noregi. Skjalatilfarið sigur lítið um, hví hetta hendi, men settar eru fram ymsar tilgitingar. Her verður tann tilgiting førd fram, at tað kann vera bretska kravið um Helgoland, sum hevur fingið Karl Johan at sleppa Norðurhavsoyggjum fyri at fáa friðin í lag beinanvegin. Á tann hátt slapp hann undan illstøðu við sameindu sínar, serliga bretar, sum vóru misnøgdir við, at hann hevði tikið seg burtur úr bardaganum ímóti Napoleon fyri at vinna Noreg.

### Abstract

The peace treaties of Kiel in 1814 between Denmark and the United Kingdom, and Denmark and Sweden ceded the island of Heligoland (Helgoland) to the UK and Norway to Sweden. In return for Norway, Denmark was given Pomerania and Rugen, the Swedish provinces in Germany. At the last moment, the treaty between Denmark and Sweden was changed, so the Norwegian islands in the North Atlantic, Greenland, Faroe and Iceland, should not be ceded to Sweden with Norway. The sources are rather silent on the reasons for this change. Different hypotheses have been put forward. Here the hypothesis is launched, that it is possible that the British demand for the island of Heligoland caused the Swedish crown prince and commander-in-chief Karl Johan relinquish on the islands in the North Atlantic in order to get the peace treaties signed at once so that he could prevent a conflict with his allies, especially the British, who were rather upset because he had pursued his own war aims instead of following the allies in their westward thrust in order to topple the reign of the emperor Napoleon.

### Inngangur

Tann 15. januar 1814, klokkan trý á morgni (Wollebæk, 1928; 17), vórðu tveir friðarsáttmálar undirritaðir í Kiel, høvuðsstaðnum í hertogadøminum Holstein. Báðir sáttmálarnir vórðu tó dagsettir tann 14. januar. Fyrri sáttmálin var millum kong Danmarkar og kong Stórabretlands og Írlands. Hin var millum kong Danmarkar og kong Svøríkis (Tractater, 187;, 56-73).

### Uniónin

Kongur Danmarkar, Fríðrikur VI, var ikki bert kongur í Danmarkar ríki, men eisini í Noregs ríki. Tann 29. august 1450 høvdu hesi bæði ríki gjørt eina uniónstraktat. Hesin fólkarættarligi sáttmáli ásetti, at ríkini skuldu verða saman sum javnlíkar í friði og kríggi, og at tey skuldu hava kong í felag. Eftir hendan dag vóru tí hvørki Danmørk ella Noreg fullveldisríki (t.e. suverenir statir). Tann unión, sum tey vóru farin uppí, hevði vegna báðar deilstatirnar myndugleika at gera sáttmálar við aðrar fólkarættareindir. "Fosturlandið" var tí, sum prósturin Fríðrikur Schmidt segði á Eidsvold tann 13. mai 1814, tann sameindi danskinorski staturin (Koht, 1925; 14).

Uniónskongurin gjørdist við sáttmálanum í Ribe tann 5. mars 1460 eisini hertogi í teimum báðum hertogadømunum Slesvík og Holstein. Slesvík var danskt len og Holstein týskt. Sáttmálin ásetti, at hertogadømini skuldu verða *ewich tosamene ungedelt* (æviga saman óbýtt). Uniónin Danmarkar og Noregs millum um felags uttanríkispolitikk varð sostatt víðkað til at fevna um hesi bæði fúrstadømi.

Øll útlendsk stýri vistu, at tá ið kongur Danmarkar gjørdi altjóða sáttmálar, var tað ikki bert í sínum eginleika sum kongur Danmarkar ríkis, men eisini sum kongur Noregs ríkis og fúrsti í hertogadømunum báðum, t.e. vegna alla ta unión, sum hann umboðaði. Men oftast varð bert nevnt í sáttmálunum, at hann varð gjørdur við kong Danmarkar eins og í hesum sáttmálum tann 14. januar 1814. Uniónin millum hesi ríki og lond hevði nevniliga einki serligt navn. Slíkt var ikki óvanligt í Evropa um hetta mundið: "Eysturríki" og "Prussland" høvdu einki navn á ríkjafelagsskapum sínum (Gustafsson, 1985; 21). Av praktiskum orsøkum varð umrødda unión tí vanliga nevnd "Danmørk".

At vera saman um frið og kríggj er at hava felags uttanríkispolitikk, og uttanríkispolitikkur er vandamikil. Tey lond, sum ikki hava nóg sterka verju, kunnu hvørva av heimskortinum. Tí mugu øll sjálvstøðug lond hava hermegi, og ofta verður hildið, at sterkari verjan er, tryggari eru tey. Men størri íløgur lond gera í hermegi, lættari er hjá teimum ráðandi at lata seg tøla til at nýta styrki sína í kríggi. Men tíverri fyri stjórnmálamenn er altíð óvíst, hvussu kríggj hilnast. Verður annar parturin ikki heilt niðurbardur, kemur tó fyrr ella seinni tann dagur, tá herovastarnir noyðast at gevast við orrustuni og heita á diplomatarnar um at seta seg við samráðingarborðið at fáa frið í lag.

Ein slíkur dagur var í Kiel í januar 1814. Við í samráðingunum vóru eitt stórveldi og tvey smáríki. Stórveldið var Sameinda Kongsríkið Stórabretland og Írland. Smáríkini vóru øðrumegin Svøríki og hinumegin Uniónin Danmørk/Noreg/hertogadømini Slesvík/Holstein („Danmørk“), sum hevði lýst kríggj ímóti hinum báðum ríkjunum í 1807 og 1813. Harumframt hevði Fríðrikur kongur VI lýst kríggj ímóti Prusslandi og Russlandi, og russiskir kosakkar vóru tí eisini við í álopinum á uniónina.

Ofta taka friðarsamráðingar drúgva tíð, viðhvørt mong ár. Men farið varð undir hesar samráðingar tann 10. januar, og sáttmálin varð sum nevnt dagsettur 14. januar. Her gekk skjótt fyri seg, og tað var tí, at ein av pørtunum var í tíðarneyð. Tað vóru sviar.

## Samráðingarstøðið

Samráðingarnar fóru fram í Kiel. Orsøkin var, at har hevði álopsherurin høvuðsstøð sína.

Fyrst vóru samráðingar Danmarkar og Svøríkis millum, síðani Danmarkar og Stórabretlands millum, og soleiðis varð skift alla tíðina, til sáttmálarnir kundu undirritast av øllum trimum pørtum.

Ofta ásetur ein friðarsáttmáli, at tapandi parturin má gjalda fyri friðin við at lata land afturfyri. Her vóru sigurharrarnir Stórabretland og Svøríki, so eftir tí skuldi Danmørk latið teimum ein part av tí landaøki, tað hevði ræði á.

Hetta lá tó ikki so væl fyri í hesum føri, tí tey lond, sum bardust við Napoleon, vóru samd um, at tey landamørk, sum vóru í Evropa fyri fronsku kollveltingina, skuldu koma afturíaftur, nú friður kom í lag. Við-

hvørt bar hetta ikki til, men fyri at halda uppi hesari ímyndan, varð tá tann loysn vald, at partarnir býttu um landaøki. Í so máta høvdu samráðingarmenninir rættiliga vítt boð, tí teir kundu altíð føra fram, at báðir partar høvdu latið nakað og fingið okkurt annað afturfyri. Ein nágreinilig meting av virðinum er altíð ring at gera og hevur ikki stóran týdning í einum føri sum hesum, tá ið endamálið er greitt: at koma fram til ein sáttmála, báðir partar kunnu undirrita.

Tað var henda loysn, sum varð sett í verk tann 14. januar 1814.

## Semjan

Í samráðingunum um friðin Danmarkar og Svøríkis millum var ikki so nógv at ivast í. Við brævi dagsett 7. januar 1814 hevði danski samráðingarleiðarin vegna Fríðrik kong VI boðað samráðingarleiðara svia frá, at hann læt frá sær Noreg við øllum rættindum tess (S. M. engage a ceder par la Traité de Paix a conclure, le Royaume de Norvege avec les droits qu' elle y a.), og at Svøríki afturfyri skuldi lata tað, sum sviakongur átti handan Eystrasalt: hertogadømið Pommern og fúrstadømið Rügen (Wollebæk, 1928; 155).

Eitt sindur øðrvísi var við samráðingunum við Stórabretland. Bretar vóru til reiðar at sleppa øllum tí, teir undir krígnum høvdu tikið frá Danmørk – við einum undantaki! Teir vildu hava ein part av hertogadøminum Slesvík, nevnliga ta 0,8 ferkilometur stóru oynna Helgoland (Nørregård, 1954; 176).

Danski samráðingarleiðarin, Edmund Bourke (1761-1821), hevði frá stjórn síni fingið eina instruks, sum segði, at bretar kundu sleppa at verða í Helgolandi, sum teir høvdu tikið í 1807, og í Anholt, sum teir høvdu tikið í 1809, men bert til kríggið var av. Til fánýtis hevði hann spurt uttanríkisráðharra sín, Niels Rosenkrantz (1757-1824), hvørja støðu hann skuldi taka, um bretar ikki vildu lata hesar oyggjar frá sær (Nørregård, 1954; 153 f.).

Henda tøgn er ring at skilja. Anholt hevði ikki nógv upp á seg, nú friður kom í lag, men Helgoland var framvegis týdningarmikið. Har høvdu bretar gjørt íløgur í skansar og havn fyri fimmhundrað túsund pund, og har høvdu næstan tvey hundrað bretskir keypmenn havt sítt virksemi, meðan Napoleon setti álit sítt á meginlandsforðingina (Anna Agnarsdóttir 2008, 106). Enn var Napoleon við valdið, og franskir hermenn høvdu støð í Hamborg. Tað kundi tí ikki útilokast, at bretar fóru at verða trekir at sleppa hesi herstøð.

Bæði sviar og bretar vistu, at danski samráðingarleiðarin hevði fulltrú til at skriva undir friðarsáttmálan, men at hann kundi krevja at leggja málið fyri stjórn sína, um nakað ivamál kom upp. Tað kundi seinka samráðingunum nakrar dagar. Fríðrikur kongur VI var staddur á Hindsgavl slotti beint vestan fyri Middelfart á Fjóni. Hvussu skjótt atborið varð, tók tað tó meginpartin av einum samdøgri at fáa boð fram til hansara, og stjórnin skuldi eisini hava tíð at viðgera málið.

Sviar eins væl og bretar høvdu illbata av, at danir í veruleikanum ikki vóru heilhjartaðir fyri friði, tí teir vónaðu, at okkurt fór at taka seg upp, sum kundi bjarga teimum undan vanlukkuni, sum hevði rakt teir.

Men tann 13. januar boðaði Thornton skrivliga Bourke frá, at kravið um Helgoland ikki var til at vika (Nørregård, 1954; 177).

Heldur enn at biðja um loyvi til at fáa

nýggjar instruksir frá stjórnini tekur Bourke dagin eftir ta avgerð, at báðir friðarsáttmálarnir skuldu undirritast beinanvegin.

## Ivamálið

Hvat var tað, sum gjørdi, at tað nú knappliga bar til at fáa samráðingarnar lidnar, hóast Thornton fekk kravið um Helgoland eftirlíkað?

Einki skjal er komið undan kavi, sum beinleiðis sigur nakað um orsøkina. Eingin av luttakarunum á samráðingarfundinum hevur sagt nakað um tað, sum er farið fram hesum viðvíkjandi.

Hetta er ein ring støða at koma í hjá søgumonnum, tí teir eru vanir við at arbeiða við haldgóðum keldutilfari. Tá keldurnar vanta, er neyðugt at gita. Men gitingar kunnu vera meir ella minni sannlíkar út frá tøku keldunum.

Í hesum føri vita vit, at friðarsáttmálin Danmarkar og Stórabretlands millum bar í sær, at Stórabretland fekk Helgoland. Vit vita eisini, at um sama mundið varð ein broyting gjørd í uppkastinum til friðarsáttmála Danmarkar og Svøríkis millum. Henda broyting var í grein 4. Har varð eitt hakk sett í tekstin beint eftir orðið "dépendances" (atlond [sum skuldu fylgja við Noregi]), og á hin breddan á arkinum varð skrivað "la Grönlande, les îles de Færöe et l'Islande non comprises" (Grønland, Føroyar og Ísland ikki umfatað).

## Samráðingarmanningin

Vit vita eisini, hvørjir teir persónar vóru, sum samráddust í Kiel hesar lagnudagar í januar 1814.

Vegna Fríðrik kong VI var tað Edmund Bourke (1761-1821), sum samráddist. Hann var føddur á St. Croix, einari av vesturindiaoyggjunum, sum Danmørk-Noreg hevði ræði á. Foreldrini vóru írsk. Hann var uppvaksin og hevði fingið sína útbúgving í Onglandi, men hevði starvast í donsku uttanríkistænastuni síðani juli 1789, har hann hevði verið sendimaður í Póllandi, Napoli, Svøríki og síðani 1802 í Spania. Hetta starv hevði hann framvegis, men hann var farin úr Madrid í august 1811 og hevði síðani verið í Keypmannahavn, har hann var álitismaður hjá Rosenkrantz, uttanríkisráðharra. Bourke var sera varin maður, ið trúliga gjørdi tað, fyristøðumenn hansara høvdu álagt honum. Einki er hoyrt um, at hann av sínum eintingum hevur tikið avgerðir í týdningarmiklum málum. Var hann ikki álítandi, varð hann ikki komin langt á yrkisleiðini, og so hevði hann als ikki fingið litið til einsamallur at fara til slíkar lagnutungar samráðingar.

Bretski samráðingarmaðurin var Edward Thornton (1766-1852). Hann hevði leingi verið í uttanríkistænastuni. Danir óttaðust hann, tí teir hildu hann vera sviahallan, og tí at hann, tá hann var sendimaður í Hamborg í 1807, hevði givið stjórn síni tey skeivu boðini um samstarvið millum Frakland og Russland, sum fingu bretar at leggja á Keypmannahavn og taka danska-norska herflotan (Nørregaard, 1954; 175). Síðani 1812 hevði hann verið bretskur sendimaður í Svøríki, og tá sviar sendu herin til Norðurtýsklands, fylgdi hann við høvuðsleguni hjá svium.

Svenski samráðingarleiðarin var Gustaf af Wetterstedt (1776-1837). Hann var rættiliga ungur komin í svensku uttanríkistænastuna og fekk eina glæsiliga yrkisleið. Hetta var ikki bert tí, at hann hevði góðar gávur og var ein frálíkur røðari, men eisini av tí at hann ongantíð himpraðist við at gera júst tað, sum yvirmenn hansara vildu hava hann til, eisini

tá tað var moralskt andstyggiligt (ett mera från alla skrupler frigjort verktyg för de godtyckligaste åtgärder från de magtägandes sida, än Wetterstedt ... visade sig vara, kan väl svårligen uppletas (Nordisk Familjebok 2. útgáva 1904-1926)). Tá hugsað verður um, at gamalt er, at ein diplomatur er ein maður, sum fær løn fyri at lúgva fyri sítt land, er hetta ein merkisverd útsøgn, sum vísir, at Wetterstedt hevur staðið seg væl í hesi hørðu kapping. Frá 1812 var hann í verki uttanríkisráðharri, og frá 1824 til sín deyð var hann tað eisini at navni.

Men tann, sum alt snúði seg um í Kiel, tann maður, sum fekk øll uppkast til góðkenningar, áðrenn tey vórðu løgd fram, og sum sambært Bourke skuldi ganga við til hvørja broyting í minstu smálutum (Nørregård 1954, 165-67), var Karl Johan (1763-1844), oddamaður í tí svenska-russiska heri, sum ein mánað frammanundan var komin sum eitt óløgi yvir um holsteinska suðurmarkið. Hann var staddur á slottinum í Kiel, har samráðingarnar fóru fram.

Karl Johan var føddur í suðurfranska býnum Pau og fekk navnið Jean Bernadotte. Av tí at ein eldri bróðir hansara æt Jean, men var uppkallaður eftir Jóannesi evangelistinum, varð hann, sum var uppkallaður eftir Jóannesi doyparanum, ofta róptur Jean Baptiste. Faðirin var sakførari, og ætlanin var, at Jean skuldi taka við í hesum yrki, men tað vildi hann ikki, og tá hann var seytjan, fór hann sjálvboðin upp í franska herin. Tá kollveltingin brast á í 1789, gjørdist tað møguligt hjá ikki-aðalsmonnum at fáa hægri tign í herinum, og skjótt varð hann oddamaður. Tá ið Napoleon gjørdist keisari í 1804, útnevndi hann nakrar av sínum fremstu herovastum til marskálkar, og var Bernadotte ein teirra. Hann var tó ikki heilhugaður viðhaldsmaður Napoleons, og tá tilboðið kom úr Svøríki um at gerast ríkisarvingi, tók hann av, m. a. fyri at sleppa undan at ganga keisaranum til handa.

Eftir at hann var komin til Svøríkis og hevði fingið sær navnið Karl Johan, hendi einki í uttanríkispolitikkinum, uttan at hann var uppií, og í veruleikanum tók hann avgerðirnar. Sviar høvdu valt hann til ríkisarvinga, tí teir hildu, at hann kundi hjálpa teimum at vinna Finnland aftur frá Russlandi. Hetta skuldi henda í samstarvi við Napoleon. Men Karl Johan læt seg ikki taka av fótum av sigrunum hjá Napoleon. Hann helt seg síggja, at fólk í øllum Evropa vendu sær frá keisaranum, og at mikla vald hansara stóð fyri falli. Eftir at Napoleon tíðliga í 1812 hertók tað, Svøríki átti í Norðurtýsklandi, fekk Karl Johan undirtøku fyri at bjóða Russlandi samgongu. Semja var um, at Svøríki ikki skuldi fáa Finnland aftur frá Russlandi, men hinvegin fáa Noreg burtur úr donsku-norsku uniónini.

Eftir at Napoleon í 1812 tapti í Russlandi, fekk Karl Johan í 1813 eisini samgongur við somu ásetingum í lag við Stórabretland og Prussland. Men smátt gekst at fáa Noreg, so sum hesi lond høvdu givið honum lyfti um.

Karl Johan var bráðtonktur maður. Hann kundi mestsum av handahógvi leggja fram stórar ætlanir, og aftraðist ikki, tá umráddi at røkka teimum málum, hann hevði sett sær. Hinvegin dugdi hann sera væl at skyna á, hvat ið bar til og hvat ikki, og tá ið á stóð, dugdi hann sera væl at laga ætlanir sínar eftir tí, sum møguligt var.

Hann var føddur leiðari og dugdi væl at fáa onnur at fylgja sær. Hann fekk hermenn sínar at seta lív í váða. Hann var ein tølandi vinur, og fyri ein mann sum Thornton var

hann uttan vomm. Tá ið hann hevði sett sær nakað fyri, himpraðist hann ikki við at nýta ósannindi, mutur og beinleiðis vald til at røkka máli sínum (Nørregaard, 1954; 255).

## Oyggjarnar í Norðurhøvum

Hesar dagarnar í Kiel var Karl Johan í essinum. Hann hevði ført hermegi sína yvir um markið hjá arvafígginda Svøríkis, og hann hevði vunnið á allari mótstøðu. Fyri at fara avstaðaftur kravdi hann at fáa Noreg, og einki skuldi forða honum í tí!

Tann 16. januar 1814, tveir dagar eftir at friðarsáttmálin er dagsettur, skrivar Gustaf af Wetterstedt til uttanríkisráðharra Svøríkis, Lars von Engeström (1751-1826). Brævið er fleiri prentaðar síður (Nielsen, 1886; 50-54), og eitt reglubrot ljóðar soleiðis:

"Hóast Ísland, Grønland og Føroyar ongantíð hava hoyrt til Noregs, hevur harra Bourke ynskt, at gjørd verður ein serlig viðmerking um tey í 4. grein í sáttmálanum, og hesum havi eg ikki hildið, at eg átti at sýta fyri. (Malgré que l'Islande, la Groenlande et les îles de Ferröe n'ont jamais appartenu a la Norvege, Mr. de Bourke a desiré, et je n'ai pas cru devoir me refuser, qu'on en fit une mention spéciale dans l'Art. 4 du Traité.)"

Vit vita, at Karl Johan, tá ið samráðingarnar vóru næstan lidnar, hevur kravt og fingið ásett eina aðra sera týdningarmikla broyting í grein 4 í sáttmálauppkastinum. Har hevði bara staðið, at Svøríki skuldi fáa Noreg. Karl Johan helt, at hetta kundi gera tað bágið hjá sær at fáa undirtøku norðmanna, og kravdi hann tí og fekk sett inn í grein 4, at Noreg skuldi gerast eitt kongsríki sameint við Svøríki. Í 1828 greiddi Karl Johan sjálvur formansskapinum í norska stórtinginum frá hesum (Nielsen, 1886; 3).

Einki segði hann nakrantíð um, hvussu tað bar til, at hann hevði sett hesa broyting í grein 4 um sama mundið, broytingin í somu sáttmálagrein varð gjørd um oyggjarnar í Norðurhøvum.

## Ímóti instruksum

Hvør kann vera komin við tí, sum Wetterstedt greiðir frá, at oyggjarnar í Norðurhøvum ongantíð hava hoyrt til Noregs?

Í bók síni um friðin í Kiel førir Georg Nørregård fram, at tað er Bourke, sum hevur gjørt eitt kvett við at bjarga kongi sínum hesar oyggjar (Nørregård, 1954; 170). Tað er merkisvert, at meðan alt annað, sum hann skrivar í bók síni, er væl og virðiliga skjalfest við upprunakeldum, so er einasta kelda til hetta uppáhald svarið frá svenska uttanríkisráðharranum, men ikki tað bræv sum Wetterstedt skrivaði honum. Men Lars von Engeström, uttanríkisráðharri, var staddur í Stokkhólmi og kundi tí ikki vita nágreinliga, hvat var farið fram í Kiel.

Danski søgumaðurin Ole Feldbæk (1936-) finst í eini grein um kielarfriðin (Feldbæk, 1990; 267) at einum øðrum donskum søgumanni, Finni Gad (1911-86), sum hevur sett fram ta hypotesu, at tað kann vera av enskum ávum, at ásetingin í sáttmálauppkastinum varð broytt norðurhavsoyggjunum viðvíkjandi (Gad, 1979). Feldbæk sigur, at einki er funnið í enskum skjalasøvnum, sum styðjar uppáhaldið hjá Gad. Feldbæk sjálvur er samdur við Nørregård um tað bragd, Bourke hevur gjørt, men hevur ikki fleiri keldur enn fyrimynd sín.

Hvat ið hent er, kunnu vit ikki vita við vissu, men tað er sera nógv, sum bendir á, at av teimum monnum, sum tóku lut í hesum samráðingum, er Karl Johan tann einasti, ið

kundi koma við einum slíkum uppáhaldi, sum í veruleikanum var tikið úr tí bláu luft, og koma væl frá tí í eygunum á samtíðarmonnum og nútíðar søgumonnum. Við tí kunnleika, søgumenn hava til Wetterstedt, er tað als ikki ósannlíkt, at Karl Johan kundi fáa hann at fara til Bourke við teimum boðum, at tá ið Svøríki hevði kravt Noreg, so var tað ikki komið svium til hugs, at Noreg fevndi um oyggjarnar í Norðurhøvum.

Bourke visti eins og øll onnur, at sviar høvdu njósnarar í Noregi, sum greiddu frá øllum viðurskiftum har. Alt, sum kom á prent og hevði við norsk viðurskifti at gera, varð sera gjølla lisið í svensku stjórnarskrivstovunum. Tann á hvørjum ári prentaði hov- og statskalendari fyri Danmørk og Noreg var svium kunnugur, og har stóð, hvat Noregs ríki fevndi um. Wetterstedt hevði so onga undanførslu fyri ikki at vita hetta, tí hann visti frá skjølunum í svenska uttanríkisráðnum, at tá Karl X Gustaf í 1657 sum treyt fyri friði kravdi Ísland og Føroyar, segði hann hesar oyggjar hoyra til Noregs ríki (Weibull, 1908; 7, 35).

Orðingin í brævinum hjá Wetterstedt kann valla skiljast øðrvísi, enn at tað er onkur annar, sum er komin til Bourke við hesum uppáhaldi, og tá hetta er farið fram undir samráðingunum millum hesar báðar menn, kann neyvan nakað vera at ivast í, at tað er Wetterstedt sjálvur, sum hevur sagt hetta. Hvat skuldi Bourke siga, tá hann hoyrdi Wetterstedt siga nakað, sum teir báðir vistu ikki passaði? Hann hevur skilt, at Wetterstedt hevur havt einhvørja orsøk til at siga so, og hon kundi bara vera tann, at Karl Johan vildi lata nakað av Noregi verða eftir í uniónini, til at fáa Bourke at svølgja tann herskna bitan, sum tað var at lata Helgoland frá sær ímóti sínum instruksum.

Karl Johan visti sjálvandi eisini, hvat ið tað Noregs ríki fevndi um, sum Svøríki í so mong ár hevði stríðst fyri at fáa lagt undir sítt vald. Men síðani Bourke kom til Kiel, hevði Karl Johan ferð eftir ferð givið út til tess at fáa frið í lag beinanvegin. Hvørja ferð, ið kinkur hevði verið á, hevði Bourke nevnt tann møguleika at venda sær til stjórn sína. So hevði Karl Johan givið so nógv út, at tað slapst undan hesi seinking.

Nú var alt komið í lag, og so kom hetta málið við Helgolandi upp. Her sást, at Bourke var misnøgdur, og vandi var fyri, at hann kundi krevja ein skáa til at leggja hendan spurning fyri stjórn sína. Ofta snávar fótur av lítlum steini. Hesi vanlukku mátti fyri einhvønn prís sleppast undan. Ikki kann útilokast, at Karl Johan hevur sæð skorfesti fyri sær. Sum ein annar gandakallur kann hann tá hava drigið ta kanin upp úr hattinum, at tað als ikki var komið svium til hugs at fáa hesar fjaru oyggjar í Norðurhøvum. Betri kundi hann halda tað verða at fáa ein minni bita enn at sita hungurstungin.

Tað einasta, sum Bourke kundi gera í hesi støðu, var at siga takk, men sum tað stendur í brævinum frá Wetterstedt, hevur hann gjørt svium vart við, at treytin fyri hesum var, at sáttmálin varð broyttur, so tað í honum kom at standa, at hesar oyggjar ikki fylgdu við Noregi. Harvið stóð greitt, at Grønland, Føroyar og Ísland til tá høvdu verið partur av Noregs ríki, soleiðis sum dómstólurin í Haag við undirtøku frá danska ad hoc dómaranum eisini segði í 1933.

## Støðan hjá Karl Johan

Tað er lætt at skilja, at Karl Johan kundi finna upp á slíkt í hesi støðu.

Nú var um reppið, at hann kundi vinna

tað, sum hann hevði stríðst fyri, síðan hann kom til Svøríkis. Men hann visti, at teir sameindu ikki vóru sannførdir um, at tað var gott fyri bardagan ímóti Napoleon, at hann við sínum herliði brúkti tíð og orku til at berjast við danir. Russar lótu sær hetta lynda og lótu hann fáa nakrar kosakkar til at styrkja álopið. Eysturríkarar og prussar vóru heldur líkasælir, men bretar vóru alt annað enn blíðir.

Tað var dýrt at hava ein svenskan her á evropeiska meginlandinum, og tað vóru bretar, sum guldu rokningina, tí teir góvu svium beinleiðis studning til herferðina. Thornton var alvinur Karl Johans, og hann skrivaði sínar frágreiðingar til uttanríkisráðharrans, Robert Stewart Castlereagh (1769-1822), í neyvum samstarvi við góða vin sín, ríkisarvingan. Thornton var tó ikki einasti bretin í høvuðsleguni. Har var eisini ein bretskur herovasti, C.W. Stewart, sum var bróðir bretska uttanríkisráðharrans. Hann var við tí spillandi orðinum um Karl Johan. Hann helt, at svenski ríkisarvingin skuldi halda uppat við sínum norska ævintýri og heldur fara í kríggj ímóti Napoleon. Tí var tað, at Karl Johan fekk at vita frá Castlereagh, at gavst hann ikki sum skjótast, kundi tað væl henda, at bretar hildu uppat at geva svenska herinum stuðul, og so mátti hann venda aftur til Svøríkis uttan úrslit og uttan vón um at gerast harri Noregs.

Karl Johan hevði miklar ímyndingargávur, og eins væl og hann kundi ressa menn sínar við stórum sjónum, so kundi hann síggja fyri sær allar møguligar vanlukkur.

Tað óvæntaða var hent, at bretar høvdu kravt Helgoland, og hetta hevði Bourke ikki heimild at játta. Hvat nú um Bourke afturfyri kundi hava eftir nakað av tí, sum hann hevði fingið heimild at lata?

Frá Thornton kundi hann fáa at vita, at støðan hjá oyggjunum í Norðurhøvum var øðrvísi enn hjá Noregi. Hann visti, at norski herurin hevði skansar um alt Noreg. Í 1808 høvdu bretsk herskip lagt á fleiri av norsku skansunum, men einasti norski skansin, teir høvdu vunnið á og oyðilagt, var skansin í Føroyum. Við kunngerð frá bretsku stjórnini tann 7. februar 1810 komu oyggjarnar í Norðurhøvum undir vernd Stórabretlands. Tey fólk, sum har búðu, kundu flyta vørur til og úr Evropa við bretskari góðkenning í hvørjum føri sær.

Hetta var ein heilt onnur støða enn hjá Noregi annars, og haðani var ikki langt hjá einum so hugskotaríkum manni sum Karl Johan at koma til, at her var eitt agn, sum kundi fáa Bourke at taka við friðarsáttmálunum, soleiðis at Noreg, hóast nakað veingjaskert, kom saman við Svøríki.

Men nú gekk alt upp. Thornton, sum var undir illgruna at vera ov sviahallur, útvegaði bretum Helgoland, einasta petti av Evropa, sum Stórabretland fekk burtur úr øllum sínum kríggjum í so mong ár. Bourke, sum tann 7. januar 1814 frá Fríðriki kongi VI hevði fingið instruks um at lata Noreg til Svøríkis við øllum teimum yvirvaldsrættindum, sum kongurin hevði arvað frá ættfedrum sínum (Nielsen, 1886; 18), fekst til at taka undir við, at ein partur av Noregi ikki skuldi fylgja við. Eins og Wetterstedt greiðir frá, royndi Bourke at mótmæla, og hann kundi sær til verju siga, at tað ikki var av hansara ávum, at hetta hendi. Hóast hetta bar hann stóran ótta fyri, at kongur ikki fór at góðkenna samráðingarúrslitið (Nørregaard, 1954; 180), so tað var ein Harrans lætti fyri hann, at bæði Rosenkrantz og Fríðrikur kongur VI hildu hann hava staðið seg væl og løntu honum fyri væl

útint verk við beinanvegin at útnevna hann sendimann í London.

Leikurin hjá Karl Jóhan endaði tí við, at hann fekk Bourke at undirskriva báðar friðarsáttmálarnar í tilhaldi Wetterstedts í Buchwaldsku húsunum í Dänische Straße í Kiel (Nørregård, 1954; 179).

## Var tað neyðugt?

Tann søgumaður, sum hevur kannað hesa samráðingatilgongd best, er danin Georg Nørregård. Hann heldur, at Bourke rættiliga skjótt er komin til, at hann noyddist at lata Helgoland uttan at leggja málið fyri stjórn sína (Nørregård 1954, 178 f.). Hvørt hetta er rætt, er ringt at siga nakað um við vissu, men er hetta rætt, so var óneyðugt hjá Karl Johan at ofra oyggjarnar í útnorði til at fáa frið í lag. Men hetta er óvist, tí keldugrundarlagið er, sum sagt, soltið .

## Niðurstøða

Úrslitið í Kiel gjørdist sostatt, at uniónin Danmørk/Noreg/Slesvík/Holstein fekk Pommern og Rügen fyri Meginlandsnoreg. Hinvegin misti uniónin Helgoland, men varðveitti Grønland/Føroyar/Ísland ella Úthavsnoreg.

## Tøkk

til Onnu Agnarsdóttir, Halgir Winther Poulsen, Ulf Timmermann, dr.phil., og Svein Ísheim Tummasson fyri hjálp og vegleiðing.

## Bókmentir

Anna Agnarsdóttir, 2008. *Aldahvörf og umbrotatímar*, 5-165 í *Saga Íslands IX*. Samin að tilhlutan Þjóðarhátíðarnefndar 1974. Ritstjórar Sigurður Líndal, Pétur Hrafn Árnason. Hið íslenzka bókmenntafélag. Sögufélag. Reykjavík 2008.

Feldbæk, O. 1990. *Denmark and the Treaty of Kiel 1814*. Scandinavian Journal of History, Vol. 15, 1990/91, pp. 259-268.

Gad, F. 1979. *La Grönlande, les îles de Færöe et l'Islande non comprises"*. A New Look of the Origines of the Addition to Article IV of the Treaty of Kiel 1814, Scandinavian Journal of History, Vol. 4 (1979).

Gustafsson, 1985. Acta Universitatis Stockholmiensis, Stockholm Studies in History, 33. Harald Gustafsson: *Mellan kung och allmoge – ämbetsmän, beslutsprocess och inflytande på 1700-talets Island*. Almquist and Wiksell International. Stockholm 1985, ISBN 91-22-00737-7, ISSN 0491-0842.

Koht, 1925. *Aktstykke frå uppgjerda millom Noreg og Danmark etter 1814*. Utgjevne for kjeldeskriftfondet ved Halvdan Koht. 1ste heftet. Oslo. I hovudkommission hjå Jacob Dybvad. 1925.

Nielsen, 1886. *Kielerfreden*. Af Dr. Yngvar Nielsen (Christiania Videnskabs-Selskabs Forhandlinger 1886. Nr. 13). Christinania. A. W. Brøggers Bogtrykkeri. 1886.

Nørregård, 1954. *Freden i Kiel 1814*. Af Georg Nørregård. Motto: "Norge, mit kære Norge." Frederik 6. København. Rosenkilde og Baggers forlag. 1954.

Tractater, 1877. *Danske Tractater efter 1800. Første Samling. Politiske Tractater*. Første Bind. 1800-1863. Udgivet paa Udenrigsministeriets Foranstaltning. Kjøbenhavn. Trykt hos J. H. Schultz. 1877.

Weibull, C.G. 1908. *Freden i Roskilde* [1658] í Historisk Tidskrift for Skåneland. Udgiven av Lauritz Weibull. Tredie Bandet. Lund 1908-1909.

Wollebæk, 1928: *Bidrag til grunnlovens historie: Om Kielertraktaten 15. januar 1814*. S. Wollebæk, byfoged. Halden 1928.